

Vit síggja hvar Bedlingtonbrunnurin verður boraður í P.1017 loycinum



Atlants kolvetni er við í fleiri útbyggingum í Norðsjónum

Eirikur Reyði leitar eftir olju fyri føroyingar

Heimsins mest framkomni pallur borar í løtuni ein brunn fyri m.a.føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni sunnan fyri markið. Loyvishavararnir hava góðar vónir um at gera eitt fund

OLJULEITING
Jan Müller

Tað eru nú gingnir umleið 25 dagar, síðani ein av heimsins størstu og mest framkomnu boripallum, Erik Raude (Eirikur Reyði) fór undir at bora ein leitibrunn í bretskum øki og skamt frá føroyska markinum, fyri m.a. føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni.

Hóast luturin hjá føroyska felagnum er sera avmarkaður, 1%, so er tað kortini lutfalsliga nógv fyri eitt lítið felags sum Atlants Kolvetni, sum hevur møguleika at hækka sín part til 2,5%. Tað er stóra og kenda bretska oljufelagið BG ella British Gas, sum stendur fyri hesi spennandi og eisini kostnaðarmiklu boringini í Bedlingtonprospektinum, umleið 30 kilometrar sunnan fyri verandi oljufelt Foinaven og Schiehallion og umleið sama tein frá markinum.

BG eigur heili 82% í loyvinum, meðan danska DONG eigur tey restandi 17%. Ætlanin er at bora í 41 dagar, so boringin er komin gott og væl í helvt. Vilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni er sera spentur, nú felagið fyri fyrstu ferð luttekur í eini leitiboring í útlendskum øki. Felagið var eisini við í brunninum, sum varð boraður í bretskum øki nøkur ár herfyri í sambandi við Marjunfundið, men tað var ein sokallaður avmarkingarbrunnur, og tí er ikki skeivt at siga, at Bedlington-brunnurin er fyrsti veruligi leitibrunnur, sum føroyska felagið er við í uttan fyri landoddarnar.

Sosialurin skiljr, at fleiri mál eru í boringini. Borast skulu umleið 4000 metrar og er hetta rættiliga djúpt sammeta vit við aðrar brunnar, sum eru boraðir vestan fyri Hetland. Marjunboringin gekk niður á umleið 4200 metrar.

Sum skilst eru vónirnar til brunnin stórar. Tað mugu tær í hvussu er vera hjá BG, sum upprunaliga átti 40% av loyvinum men keypti 42% aftrat frá Amerada Hess. Við øðrum orðum hevur BG heili 82% av øllum váðanum, og tað er sera nógv í hesi vinnuni. Tað merkir eisini, at jarðfræðingarnir hjá felagnum hava rættiliga stóra tiltrúgv uppá, at her er stórur møguleiki fyri at gera eitt fund.

Vit hava spurt Vilhelm Petersen, hvussu tað so ber til, at eitt felag sum Amerada Hess sleppur sær av við sín part av hesum loyvinum. Hann sigur, at hetta tykist at vera í tráð við politikkin hjá felagnum í Norðsjónum og Europa sum heild. Hess er við at taka seg út úr fleiri og fleiri londum í hesum partinum av heiminum og raðfestir harafturímóti leiting í øðrum þortum av heiminum størri. Eitt nú seldi Hess sín part í krúnjuvelinum hjá sær, Scott-feltið, hervfyri. Tað var fyristøðufelag.

Eirikur Reyði er ein av heimsins størstu og best útgjørdu boripallum. Nú borar hann m .a. fyri føroyska oljufelagið Atlatns Kolvetni. Mynd Atlantic Petroleum

Vilhelm Petersen sigur annars, at Atlants Kolvetni er komið rættiliga langt við ætlan síni at tekna nýggjan partapening. Eitt prospekt er gjørt og verður tað almennt um mánaðaskiftið oktober-november. Tá hevur felagið so heimild at tekna upp til 30 mill. kr. í nýggjum partapeningi. Hetta er so eisini fyrstu ferð, at møguleiki eisini verður hjá útlendingum, at seta pengar í Atlants Kolvetni. Peningurin skal m.a. brúkast til luttøkuni í trimum feltum á bretskum øki, sum føroyska felagið hevur keypt partar í. Við hækkandi oljuprísum kann hetta gerast ein góð forrætning skilst.

Spenningur

Tríggir aðrir áhugaverdir brunnar eru boraðir á Atlantsmótinum í summar. Allir á bretskum øki. Enn er einki komið út alment um úrslitið av hesum boringum, men tað hevur kortini ljóðað í oljuverðini, at talan kann vera um fund, og at møguleiki er fyri, at tað verða útbyggingar til bæði gass og olju. Leitibrunnarnir, sum talan er um, eru tveir beint við føroyska markið, Cambo (Lindisfarne) og Lochnagar (Rosebank) og so eisini ein avmarkingarbrunnur í Lagganfeltinum, har talan er um gass.

Um vit nú ímynda okkum, at í hvussu er ein ella tveir av hesum íalt fýra brunnum vestan fyri Hetland, eru lønandi fund og kunnu útbyggjast, so kemur tað at seta heilt nýtt fokus á Atlantsmótið og fer tað so eisini at kunna ávirka áhugan fyri leiting í føroyaøkinum, eitt nú eini komandi 2. rundu. Allar umrøddu boringar eru "tight hole" tvs. at eingir upplýsingar fara út um úrslitið, í hvussu er ikki enn.

Um nakað áhugavert spyrst burtur úr hjá Atlants Kolvetni sunnan fyri markið fer tað at knýta Føroyar uppaftur tættari at altjóða oljuvinnu.

Tað er eisini áhugavert at merkja sær, at eitt av teimum mest áhugaðu oljufeløgunum á føroyska landgrunninum, danska DONG, er við í øllum teimum fýra brunnunum, sum vit hava umrøtt omanfyri og sum eu og verða boraðir vestan fyri Hetland.

Innfluttur fiskur skal útflytast sum føroyskur

Trupulleikar hjá føroyskum fiskaframleiðarum at fáa fatur á nóg mikið av rávøru kunnu verða loystir í næstum - tá tað verður møguligt hjá føroyingum at innflyta fisk úr triðjalondum og útflyta fiskavørur harav til ES sum føroyskar

HANDILSAVTALA
Búi Tyril
tyril@PRnewsMedia.com

Tøka av laksi uttan fyri Haldarsvík. Nú alt bendir á at trot verður á føroyskum laksi, kunnu virkini ístaðin innflyta laks úr Noreg fyri at tilvirka hann í Føroyum og útflyta hann sum føroyskan

Foto: Jens Kristian Vang

Bakkafrost á Glyvrum hevur úr at gera í løtuni. Tey 80 starvsfólkini á virkinum skera hvørja viku millum 110 og 140 tons av laksaportiónum at útflyta til ES marknaðin. Tann peningaligi umsetningurin av hesum virksemi liggur millum hálvatriðju og fýra milliónir krónur um vikuna, og hetta skal kunna geva vinning um alt gongur sum tað skal. Tað sær tað eisini út til at gera.

Men um eitt ár er trot á føroyskum laksi og tað merkir at so er eingin rávøra til Bakkafrost, og sama søga ger seg galdandi fyri aðrar framleiðarar av føroyskum laksi so sum Faroe Seafood Processing Fuglafjørður – tað er, um ikki alternativar loysnir finnast.

Tey ið varða av hesum virksemi hava via Vinnuhúsið og aðrar instansir greitt frá at rávøru grundarlagið í Føroyum er um at hvørva hvat laksi viðvíkur, samstundis sum tað er óstøðugt hvat øðrum fiskasløgum viðvikur. Hvat er tá til ráða at taka?

Loysnin er innflutningur av fiski úr triðjalondum til virðisøking í Føroyum og víðari útflutning til ES uttan um tollmúrarnar. Alt bendir á at ein avtala um hesi viðurskifti er á trappuni.

Russland ikki við

– Mong virkir seta stórar vónir til at Føroyar koma við í eina skipan fyri kumulering, segði vinnuráðgevin Hans Jákup Mikkelsen.

– Undanfarna Landsstýri var komið rættiliga langt ávegis og eg rokni við at málið er komið víðari við núverandi Landsstýri. Tá var tað upp á tal at ein avtala skuldi kunna koma í gildi við ársbyrjan 2005.

Sum skilst hevur málið rullað sína regluliga kós síðani tá.

– Bæði undanfarna og sitandi Landsstýrið hava arbeitt við at fáa Føroyar við í í ta pan-europeisku skipanina fyri kumulering, segði Herluf Sigvaldsson, deildarstjóri á Uttanlandsdeildini hjá Løgmansskrivstovuni.

– Málið er nú í Bruxelles við at verða lagt fyri ES ministararáðið og her heima fyri Uttanríkisnevndina hjá Løgtinginum. Avgerðirnar verða tiknar av ES ministararáðnum og løgmanni, tó skal avtalan formliga góðkennast av Felagssnevndini hjá Føroyum og ES. Vónandi kann tað formella undirskrivast tá Felagssnevndin hevur sítt ársfund í november, á hesum sinni í Havn.

Heilt uttan trupulleikar hevur tað ikki verið at koma fram til hesa handilsavtalu.

– Trupulleikin hjá Føroyum hevur verið at fáa laks og rækjur við í avtaluna, segði Hans Jákup Mikkelsen.

– Men eg havi nú skilt at tær eru við, tó havi eg ikki fingið hetta váttað.

Sambært tær upplýsingar vit hava fingið umfatar avtalan allan botnfisk umframt rækjur og laks. Hetta merkir í praktikkinum at føroyingar kunnu keypa fisk úr Noreg og Íslandi og tilvirka hann her fyri síðani at senda flak, portiónir og annað til ES marknaðinum sum fiskavørur við føroyskum uppruna.

Russland roknast ikki millum tey umfataðu triðjalondini, sum annars eru: Bulgaria, Sveits íroknað Liechtenstein, Tjekkiska Lýðveldið, Estonia, Ungarn, Ísland, Lithuania, Latvia, Noreg, Poland, Romenia, Slovenia, Slovakiska Lýðveldið og Turkaland.

FAKTA

Hetta skal avtalan innibera

Sum vit hava skilt tað, so skal avtalan um paneuropeiska kumulering geva til dømis hesar møguleikar:

Keypa laks úr Noreg og virka hann til flak ella portiónir og selja hann til ES við norskum uppruna;
Keypa laks úr Noreg og roykja hann og selja hann til ES við føroyskum uppruna;
Selja laks til Noregs sum so verður skorin til flak ella portiónir og seldur til ES við føroyskum uppruna;
Selja laks til Noregs sum so verður royktur og seldur til ES við norskum uppruna.

Laksur fær føroyskan uppruna um hann verður royktur, marineraður ella á annan hátt transformeraður. Um laksurin verður skorin til flak ella portiónir skiftir hann bert uppruna, um hann verður virðisøktur meira enn rávøran kostar. Hinvegin, um hann ikki verður virðisøktur meira varðveitir hann norskan uppruna; tað vil siga at upprunin verður ikki verri enn tað.

Avtalan umfatar onnur lond enn Noreg, millum annað Ísland, og onnur fiskasløg enn laks, millum annað tosk og annan botnfisk.

Akfør og ferðsluvanlukkur

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur júst latið úr hondum hagtøl, sum sýna sambandið millum tal av bilum og tey, ið fáa deyðamein í ferðsluni

FERÐSLA
www.rff.fo



Talvan sýnir sambandið millum samlaða talið av akførum og ferðsluvanlukkur, har fólk hava latið lív

Tað eru 82 ár liðin síðan fyrsti bilurin kom til Føroya. Fyrsta ferðsluvanlukkan, ið kravdi mannalív, hendi í 1928, og higartil hava 248 fólk látið lív í ferðsluni her á landi.

Hildið verður álítandi, at fyri hvønn tann, sum doyr í ferðsluni, verða 25 fólk skadd, og av teimum fáa 10% varandi mein. Samsvarandi hesum hava tí o.u. 6200 fólk fingið skaða í ferðsluni, og av teimum hava 620 fingið varandi mein.

Í 1950-1960-árunum doyðu 4-5 fólk í miðal um árið í Føroyum fyri hvørji 100.000 fólk.

Í árunum 1970-1979 veksur hetta talið til 13, frá 1980-1989 til 20, og í árunum 1990-2001 minkar tað so niður í 10 deyð fyri hvørji 100.000 fólk.

Seinnapartin í 80-árunum, tá ið ringast stóð til, doyðu 23 fólk fyri hvørji 100.000 fólk í ferðsluni í Føroyum.

Sammett við onnur lond, vóru Føroyar tá millum tey ringast staddu lond í Evropa á hesum øki, tí bara Portugal og Grikkaland høvdu hægri tøl, enn vit tá høvdu.

Í 90-árunum lækkaði talið niður um helvtina, og tey seinastu fýra árini er miðaltalið farið niður um 4 deyð um árið ella 6,9 fyri hvørji 100.000.

Henda positiva gongd hevur borið við sær, at nú eru Føroyar komnar ájavnt við Danmark, og eru annars í hølunum á Noregi og Svoríki, sum, saman við Bretlandi, hava frægastu ferðsluviðurskifti í heiminum, nevnliga 6-7 deyð fyri hvørji 100.000 fólk.